## DAGSINS MEINING

# Tiltak í tøkum tíma

Fráfarni norski forsætisráðharrin Kjald Magne Bondevik gjørdi ikki nógv um seg á heimavølli. Han var á odda fyri minnilutastjórn, ið var veik og eyðkend av innanhýsis ósemjum. Hinvegin kom Bondevik langt við sínum uttanríkispolitikki. Hann setti av álvara Noreg á politiska heimskortið. Undir leiðslu Bondeviks gjørdist Noreg eitt undangonguland á tí humanitera økinum eins væl og við sínum virkna friðarpolitikki. Noreg gjørdist ein vælumtókt og sera virkin semingstjóð í altjóða politikki. Eftir áheitan frá ST ella frá pørtunum sjálvum skipaði Noreg fyri friðartingingum víða hvar í heiminum, eitt í á Sri Lanka og í Sudan. Men eisini í Miðeystri hevur Noreg undir leiðslu av Bondevik havt ein týðandi friðarleiklut – fyri ikki at tala um tann humanitera leiklutin. Onnur dømi kundu verði nevnd. Undir leiðslu Bondeviks vísti Noreg seg ofta sum eitt land, sum ikki uttan víðari fylgdi eftir USA í einum og øllum soleiðis, sum eitt nú Danmark ger undir leiðslu av Anders Fogh Rasmussen.

Nú Bondevik er farin úr politikki med alla, er hann farin undir eitt nýtt og sera áhugavert tiltak. Hann hevur stovnað ein altjóða friðar- og semingsstovn við heimstaði í Oslo. Talan er um ein stovn, ið skal granska ósemjur kring heimin, og sum skal koma við ítøkiligum uppskotum til loysnir av slíkum ósemjum. Eisini skal stovnurin støðugt gera metingar av politisku støðuni í heiminum. Og síðst men ikki minst skal stovnurin virka sum semingsstovnur í altjóða ómsemjum. Talan er serstakliga um ósemjur, ið kunnu enda við hernaðarligum samanbrestum ella beinleiðis við kríggi. Hesin nýggi friðar- og semingsstovnurin skal samstarva við stovnar av sama slagi í Finlandi og í Svøríki.

Tað hevur eydnast Bondevik at skapa breiða politiska undirtøku fyri sínum nýggja tiltaki. Formaður í stýrinum fyri stovnin er fyrrverandi formaður Arbeiðaraflokksins, Torbjørn Jagdland, stórtingsformaður. Aðrir kendir norðurlendskir politikkarar eru stýrislimir t.d. finski forsetin. Tiltak Bondeviks hevur fingið sera góða og jaliga móttøku í øllum Norðurlondum og víða um allan heim. Tað er væl skiljandi, tí stórur tørvur er á einum slíkum stovni og stigtakarin hevur stóra altjóða virðing. Heimurin gerst alt meira ófriðarligur og konfliktir eru alla tíðina. Hartil koma teir ovurstóru trupulleikarnir av tí støðugt vaksandi muninum millum rík og fátæk lond. Júst í hesum er mangan upprunin til yvirgang og stórar og vandamiklar ósemjur at finna. Tað hevur tí stóran týdning at tað eru stovnar, ið kunnu granska altjóða ósemjur, sum støðugt kunnu fylgja við gongdini, og sum kunnu bjóða seg fram við semingsloysnum. Tað er áhugavert, at nýggi stovnurin verður fíggjaður av norska vinnulívinum. Sjálvandi fær vinnulívið nakað burturúr, eitt nú góða og jaliga umrøðu. Lat tað so vera, tað er kortini áhugavert, at privatar og almennar vinnufyritøkur taka ábyrgd av altjóða friði og seming.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Svíkur Tjóðveldisflokkurin føroysku tjóðina?



**JÓANNES EIDESGAARD**
Løgmaður

**– Hví er tað so umráðandi hjá tjóðveldisfólki at sannføra øll um, at vit við uttanríkislógini hava avreitt rættindini? At sjálvsavgerðarrætturin er niðurbundin, at vit eru dnskir húskallar og at vit eru »kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne?« Skilur tjóðveldið veruliga ikki, hvussu vandamikið hetta er fyri sjálvstýrissakina, spyr løgmaður**

Í eini røð av lesarabrøvum undirgrevur Tjóðveldisflokkurin egna sak við aftur og aftur at føra fram, at vit við uttanríkispolitisku lógini eru komin undir grundlógina, og at tað nú nærum er ógjørligt at koma úr ríkisfelagsskapinum. Ringasta avleiðingini er, at fólkið verður villleitt, og í seinasta enda kann hetta skaða sjálvstýrismálið meira enn nakað annað. Innleggið frá Heidi Petersen »Sveik løgmaður føroysku tjóðina« er fult av pástandum, sum eru ikki bert skeivir, teir eru ógvuliga villleiðani.

Heidi Petersen førir fram, at »eftir at uttanríkislóginar vórðu samtyktar á Føroya Løgtingi í summar, skulu danir nú eisini avgera framtíð okkara, tí nú skulu tvey donsk fólkating og ein donsk atkvøða til fyri at lima okkum út úr “kongaríkinum Danmark”, og teirri donsku grundlógini.«

Veruleikin er, at donsku viðmerkingarnar siga, at skulu vit hava uppaftur víðari heimildir enn uttanríkislógin gevur okkum, *uttan at vit fara úr danska ríkinum,* so er neyðugt at broyta donsku grundlógina. Vit loysa frá Danmark eftir egnari avgerð nær vit vilja uttan nakra grundlógarbroyting yvirhøvur!

Uttanríkislógin broytir ikki eitt komma í ríkisrættarligu støðu okkara. Vit sleppa eins væl úr ríkisfelagsskapinum nú, sum áður.

Heidi Petersen skrivar víðari, at vit eru fullspottað, tí uttanríkislógin nú er fráboðað ST.

Uttanríkislógin hevði onga meingin givið, varð hon ikki fráboðað ST, tí tað er við fráboðanini, at umheimurin fær boð um, at vit nú hava víðkaðar heimildir á uttanríkispolitiska økinum!

Síðani skrivar Heidi, at »allur heimurin verður gjørdur kunnugur við, at Føroyar eru samrunnin partur av Danmark og er undirgivin donsku grundlógina.« Hvør skal siga, at henda seinasta fráboðanin frá dønum broytir nakað heilt grundleggjandi. Men sum eg fleiri ferðir havi ført fram, so hava danir sent fráboðanir til ST mangar ferðir síðani 1948, m. a. í 1998, har skrivað verður »According to this Act the Faroe Islands are a self-governing community within the Danish Realm«. Sum merkir: »Sambært hesi lóg (Heimastýrislógin) eru Føroyar eitt sjálvstýrandi “fólkasamfund” í danska ríkinum.«

Heidi Petersen veit fullvæl, at tað var Høgni Hoydal, varaløgmaður, sum umsat sjálvstýrismál, tá ið henda fráboðanin varð send ST.

Síðani vísir Heidi Petersen á brotið »... det vil derfor forudsætte en grundlovsændring, hvis Færøerne statsretligt skulle have adgang til på egne vegne at handle i mellemfolkelige anliggender«. Hvørki Føroyar ella Grønland hava í dag rættin at føra seg fram sum sjálvstøðug ríki, tí vit eru ikki sjálvstøðug ríki. Heldur ikki her broytir uttanríkispolitiska lógin nakað. Fara vit úr ríkinum, er henda regla sjálvandi ikki galdandi longur, tí tá er ikki talan um at geva einum parti av ríkinum sjálvstøðugar heimildir.

Hinvegin gevur Uttanríkispolitiska lógin okkum rættindi til at gera avtalur – uttan at biðja um heimildir í Danmark – á økjum vit sjálvi ráða yvir. Tí hava vit nýliga skrivað undir sáttmála við ES, Norra, Sveits og Ísland í sambandi við kummuleringsskipanina. Allir hesir sáttmálar eru undirskrivaðir av Føroyum, og uttan danska luttøku yvirhøvur. Hetta ber til *einans tí at uttanríkispolitiska lógin kom í gildi á Ólavsøku.*

Hví er tað so umráðandi hjá Heidi Petersen og Tjóðveldisflokkinum at sannføra føroyingar og umheimin um, at vit við uttanríkislógini hava avreitt rættindini? Við hugtøkum sum:

»sjálvsavgerðarrættur okkara liggur niðurbundin í danskari lóggávu«

»danskir húskallar heldur enn frælst fólk«

At vit nú bert eru »kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne?«

Skilur tjóðveldið veruliga ikki, hvussu vandamikið hetta er fyri sjálvstýrissakina?

»Eingin er fullspottaður, fyrr enn hann spottar seg sjálvan...« skrivar Heidi Petersen!!

*jei@tinganes.fo*

# Mamma, hvat er tað at vera pappitist?



**DÁNIAL Á DUL JACOBSEN**
Fyristøðumaður

**– Bert einaferð í lívinum havi eg kent meg hongdan alment tí eg var »øðrvísi«. Tað var av Annitu á Fríðriksmørk, tá hon østi seg inn á Bill Justinussen, tí hann hevði valt meg og onnur í vísindasiðsemisnevndina, skrivar Dánial á Dul Jacobsen**

Eftir kjakið í SvF týskvøldið rann mær í huga, tá eg sum 5-6 ára gamal, ørkymlaður kom heim og spurdi mammu mína: »Mamma, hvat er tað at vera pappitist?«

»Hví spyrt tú um tað góði?«

»Maria bleiv ill og sigur, at eg sleppi ikki at spæla saman við henni og hinum børnnum, tí eg er pappitist«.

Mamma fortaldi mær so um munin millum tey, sum gingu í Ebenezer og á teimum, sum gingu í kirkju. Seinni fortaldi hon mær eisini um langommu, Agnas hjá Jógvan á Dul, sum varð koyrd frá sum lærari, tí hon var blivin pappitist og doypt umaftur. Upp í gjøgnum barna- og skúlaárini bleivst tú av og á mintur á, at tú vart øðrvísi enn onnur. Tó, ikki nakar stórvegis trupulleiki og um nakað, so menti hetta meg. Lærdi tíðliga at verja mínar egnu meiningar og ikki vera fullkomiliga bundin at meiningunum hjá øðrum.

Bert einaferð í lívinum havi eg kent meg hongdan alment út vegna »munin«, og tað var av Annitu á Fríðriksmørk. Hetta var tá hon, saman við øðrum, østi seg inn á Bill Justinussen, tí hann hevði valt meg og onnur í vísindasiðsemisnevndina. Hetta hóvaði, vegna henda sama mun, ikki henni.

Í viðmerkingunum til »Uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í revsilógini...« varð sagt at:

»Uppskotsstillararnir eru fult greiðir yvir, at ein hvørki kann lóggeva ella revsa mannamun og happing úr føroyska samfelagnum.«

Hetta haldi eg, at Annita sjálv er besta dømi um.

*danjac@post.olivant.fo*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.